

# Krokodillur í Queensland

Stór vatnflóð har norðuri í Avstralia hevur havt við sær, at myndugleikarnir nú ávara fólk um at halda eyga við krokodillum, sum dusa sær í tí nógva vatninum. Millum annað eru fólk ávarað um, at onkur skal hava borið eyga við krokodillur nærhendis Normanton í statinum Queensland. Har hava myndugleikarnir lýst stór øki í undantaksstøðu, eftir at 17 áir eru farnar upp um áarbakkarnar. Nógv hús standa undir í vatni, og myndugleikarnir siga, at krokodillur kunnu liggja upp á lúr millum húsini.



*- Nógv av argumentunum fyri at varðveita smáu bygdarskúlarnar er tað reina nostalgi. Um ein næmingur situr í Leirvík og sær hesa síðuna av fjallinum, ella um hann situr í Gøtu og sær hina síðuna av fjallinum ger skúlan hvørki betri ella verri. Vit mugu taka eina fakliga diskussión um, hvat er gott fyri barnið, staðfestir Fríðfinnur Johnsson*



*Tað er eisini tungt hjá smáu skúlunum at liva upp til fakligu krøvini í allari heildini, tí tað eru ikki lærarar til tað, og ein lærari megnar ikki alt, sigur Fríðfinnur Johnsson*

hava definitiónir fyri, hvat næmingurin skal duga tá og tá í skúlasysteminum, sigur Fríðfinnur Johnsson.

## Enska skúlasystemið góð fyrimynd

Sjálvur er Fríðfinnur Johnsson heitur forsprákari fyri, at vit grundleggjandi broyta okkara skúlasystem, og taka eitt skúlasystem til okkum, sum líkist meira tí bretska. Har er fólkaskúlin býttur í fleiri sjálvstøðugar eindir. Fríðfinnur Johnsson kundi hugsa sær eina líknandi skipan her, fyrst við grundskúla, við 1.flokk til 3.flokki, síðani ein millumskúla við flokkunum frá 4.- og til 7.flokk, og at enda framhaldsdeildini, sum hon er í dag.

-Tú kanst ikki spesialisera teg í at læra sjey árgangir at lesa og skriva. Tað letur seg ikki gera. Tað er eisini tungt hjá smáu skúlunum at liva upp til fakligu krøvini í allari heildini, tí tað eru ikki lærarar til tað, og ein lærari megnar ikki alt. Tí skal tú heldur hava eina slíka skipan, har tú kanst spesialisera teg við at læra børnini grundleggjandi at lesa, skriva og rokna, sigur Fríðfinnur Johnsson. Hann heldur eisini, at størri skúlin er, betri eru møguleikarnir fyri at fakligu førleikarnir eru í lagi til øll fakini, og soleiðs fær næmingurin mest burturúr.

## Niðurleggi smáu skúlarnar

Fríðfinnur Johnsson heldur tað vera burturvið, at tá kommunurnar eru lagdar saman, at skúlarnir ikki eisini eru tað. Hann heldur ongar sosialar fyrimunir vera við smáum flokkum.

- Danskar kanningar vísa, at fer flokkurin undir 15 næmingar, er vandin fyri at tann einstaki næmingurin ikki finnur ein, sum hann ordiliga »klikkar« við nógv størri. Tekur tú til dømis her í Leirvík, so hava vit eina gentu í fyrsta flokki. Skal hon so ganga sjey ár í skúla, áðrenn hon kemur í flokk við eini aðrari gentu? Løgdu vit tildømis fyrstu flokkarnar í Gøtu og Leirvíkar skúla, vóru sjey gentir, og tað er absolutt ein sosialur fyrimunur við størri flokkum, sigur Fríðfinnur Johnsson.

Eisini fýlist hann á, at nógvu smáu skúlarnir, har tað er gott at koyra ímillum, ikki langtsíðan eru samanlagdir.

- Sjálvandi má tú hava ein skúla í Fugloy, og í Svínoy, fyri at taka nøkur dømi. Men hyggur tú eftir Kunoy, so hevur tú brúkt næstan 30 milliónir uppá at byggja ein tunnil, meðan tú als ikki nýtir hann. Tú hevur ein skúla í Kunoy og ein í Haraldssundi, við ávíkavist seks og fýra næmingum. Hví skal tú brúka tveir lærarar til 10 næmingar, meðan tú í Havn skal hava 26 næmingar fyri yvirhøvir at fáa ein flokk, spyr Fríðfinnur Johnsson undrandi.

Hann heldur eisini at tað er fyrimunur fyri lærararnar, um teir sleppa undan at skula undirvísa sjey árgangum í fleiri fakum samstundis.

- Lærarar, sum skulu undirvísa í fleiri lærugreinum, hava ongan møguleika fyri veruliga at førleikamenna seg víðari, staðfestir Fríðfinnur Johnsson.